**Heimarøktin og Serforsorgin**

# Stuðul til Stuðulsskipanina fyri vaksin

**Stuðulsskipanin fyri vaksin søkir eftir einum stuðli til 3 brúkarar í vestara parti av Norðstreymoy**

Arbeiðsuppgávurnar eru at stuðla og stimbra brúkararnar í gerandisdegnum og hava samband/samskifti við teir um hvønndagslig viðurskifti.

Arbeiðstíðin er 12½ til 15 tímar um vikuna til allar tríggjar. Møguleiki er at hækka normeringina.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar, ið hava útbúgving sum pedagogar, heilsuhjálparar og starvsfólk við líknandi útbúgving hava fyrimun til starvið.
Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primært ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá pedagogfelagnum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um størv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi dag-, kvøld, og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið frá sosialráðgeva Finni Joensen tlf. 354020.

Umsókn saman við útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu innan 26.juni 2006 sendast til:

**Stuðulsskipanina fyri vaksin**
Løkjatún 1,
F0–160 Argir · Tlf. 354020

# Avloysarar

Søkt verður eftir tveimum avloysarum fyri starvsfólk í svimjihøllini í Vágs kommunu at byrja 3. juli 2006.

Ynskiligt er at umsøkjarar hava hóskandi royndir.

Starvið er lønt samsvarandi sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petry Joensen, tlf. 373024.

Umsóknin saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Vágs kommunu í hendi í seinasta lagi 21. juni 2006 kl. 12.00.

Umsóknin skal sendast til:

**Vágs Kommunu**
**FO-900 Vágur**
**Viðm. avloysari**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur til B8

Eitt avloysarastarv fulla tíð, í skiftandi vaktum, er leyst at søkja til setan frá 1. august 2006 ella eftir avtalu, til og við 31. januar 2007. Møguleiki er fyri lægri brøki.

**Arbeiðsøki er í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til kardiologiskar sjúklingar

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í røkt og viðgerð av cardiologiskum sjúklingum
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt, avbjóðandi og fjølbroytt umhvørvi
- fakliga kompotentar og virknar starvsfelagar
- innleiðslu og upplæring

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
- cardiologiskar royndir
- cardiologiska eftirútbúgving

Vegna umvælingar á B6, B7 og B8 í ár, er B8 flutt á B7 frá 1. maj 2006. Nýumvælda og spennandi B8 er væntandi klárt at taka í nýtslu 1. august 2006. B7 letur aftur vegna umvælingar 1.september 2006. Tá verða eisini aðrir enn cardiologiskir sjúklingar á B8.

**Løn- og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at venda sær til Astu Joensen, deildarleiðara, telefon 304500, lokal 6068 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, e-post asap@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 28. juni 2006 kl. 12.00.
Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.

**Skivlig umsókn** merkt "umsókn til starv" við CV, avrit av prógvum, autorisation, skjølum o.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# Skrivstovufólk

Ferðaskrivstovan My Faroe í Keypmannahavn søkir eftir skrivstovufólki til byrjan 1. august 2006.

Ert tú ábyrgdarfull/ur, kann arbeiða sjálvstøðugt, røkin, »servicemindaður« og fúsur til at starvast í einum arbeiðsumhvørvi har nógv ferð er á, so hava vit eitt áhugavert starv við góðum arbeiðsumstøðum.

Fyrimunur er at tú hevur royndir innan ferðavinnu:
- kunnleika til bókingarskipanir innan ferðavinnuna (Amadeus)
- kunnleika til at fyrireika og selja »pakkaferðir«
- kunnleika til føroyskt viðurskifti innan ferðavinnu
- kunnleika til »MS Officepakkan«.

Løn eftir avtalu.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og CV skal vera My Faroe í hendi seinast 20. juni. Umsóknin skal sendast sum teldupostur til therese@myfaroe.dk

Um tú ynskir at vita meira um starvið kanst tú venda tær til Theresu Turidardóttir Kreutzmann, stjóra, tlf. 33 31 36 00 ella senda teldupost til therese@myfaroe.dk

My Faroe
AMAZING NATURE

**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Serstovnadeildin*

# Reingerðarfólk

## til Verkstaðið Vón

Á Verkstaðnum Vón er eitt starv sum reingerðarfólk 20 tímar um vikuna leyst til setan 14. august 2006.

Verkstaðið Vón er ein vardur verkstaður og er dagliga karmur um arbeiðslívið hjá uml. 43 vaksnum arbeiðsfólkum við menningartarni og 13 starvsfólkum.

Á staðnum er dagliga stórt og fjølbroytt virksemi millum kl. 8.00 og 16.00, og í vetrarhálvuni eisini týskvøld.

Arbeiðstíðin hjá reingerðarfólkinum verður sostatt uttanfyri hesi tíðarbil.

Umsøkjarin skal vera fleksibul og skal hava áhuga í at arbeiða á einum arbeiðsplássi í støðugari menning, og skal somuleiðis vera røkin og lættur at samstarva við.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Fíggjarmálaráðið.

Skriftlig umsókn skal sendast til:

**Verkstaðið Vón**
Att: Maud Wang Hansen, leiðari
Postsmoga 2003
165 Argir

**Umsóknarfreistin er 14. juli 2006.**